# HEILSANIR



**Góða ommulang**
Hjartaliga tillukku við 85 ára degnum. Takk fyri tú altíð hevur verið so góð við okkum.
**Heilsan langommubørnini**



**Góðu Trygvi og Jón**
Hjartaliga tillukku við 13 og 8 ára føðingardøgunum 11. og 14. august. Alt tað besta ynskja vit tykkum.
**Heilsan Emma og abbi á Skála**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 30. juni 2001 so hugnaligan og ógloymandi.
**Maria og Djóni á Boðanesi**



**Til mína fittu sólstrálu**
Tillukku á 10 ára degnum.
**Bobby og Inga most**



**Góða kona**
Hjartaliga tillukku við 50 ára føðingardegnum í dag. Takk fyri tey góðu árini saman við tær.
**Ynskir maður tín**



**Góði fitti Óðin!**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum í morgin. Mamma og babba hjá tær fáa eisini eina heilsan.
**Frá gubba, ommu og abba**



**Góða fitta Silja**
Hjartaliga tillukku við teimum 8 árunum tann 11. august.
**Ynskja mamma, Magnus, Barbara og Anna**



**Góða Sjanna og Tórður**
Hjartaliga tillukku við 25 og 15 ára føðingardøgunum, Tórður, framhaldandi góða eydnu við fótbóltskappingini.
**Ynskja mamma og babba**

## Ársaðalfundur

Føroya Blindafelag hevur ársaðalfund leygardagin 25. august 2001 kl. 10.00.

Fundurin verður hildin á Føroya Blindastovni, Íslandsvegur 10 A, Tórshavn.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

Sosialurin
www.sosialurin.fo



# TILTØK

## FØÐINGAR

3. august fingu Heidi K. og Tórolvur Jacobsen, Syðrugøta eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4200 gr.

4. august fingu Turið av Teiginum og Eirikur Jacobsen, Keypmannahavn ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3990 gr.

4. august fingu Vivian Dahl og Regin Joensen, Argir eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3200 gr.

6. august fingu Anna Elisa Jacobsen og Hallur Berg, Sørvágur eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3000 gr.

7. august fingu Eyðgerð Hentze og Marner Joensen, Vestmanna eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

7. august fingu Irdi Elisa Andreasen og Kaysten Andreasen, Hósvík ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3600 gr.

8. august fingu Oluffa Joensen og Hans Jacob Nystrøm, Klaksvík tvíburðar – dreingir. Tann eini var 50 cm. langur og vigaði 2700 gr., hin var 47 cm. langur og vigaði 2400 gr.

8. august fingu Anja og Jógvan Eidesgaard, Eiði eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3050 gr.

8. august fingu Oddbjørg og Birgir Johansen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3305 gr.

## ANDLÁT

2. august
Ingeborg Michelsen, fødd Egholm, 94 ár

5. august
Jóhannus Olsen, Vestmanna, vanliga nevndur Jóhannus hjá Funningspól, 84 ár

5. august
Asbjørn Petersen, Tvøroyri, 58 ár

6. august
Kim Hanusson, ættaður úr Leynum, búsitandi í Havn, 81 ár

7. august
Joen Hendrik Zachariasen, Sørvágur, 64 ár.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 18. august kl. 9 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Guðni P. Peturdóttir, Toftum og Jørgen F. Andreasen, Leirvík. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík eftir vígsluna. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 11. august á tlf. 447702 ella 443180.

Leygardagin 18. august kl. 16 giftast í Sands kirkju Vivian Olsen, Tórshavn og Dánjal Jákup Berg í Soylu, Sandur. Veitslan verður í felagshúsinum Virkinum á Sandi kl. 19.30 fyri innbodnum.

## 75 ÁR

Mikudagin 15. august fyllir Símun Waag Høgnesen, koyrilærari, Klaksvík, 75 ár. Hann er burturstaddur.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 11. aug.: Bodil Nielsen, tlf. 441490
Sunnudagin 5. aug.: Knud Jacobsen, tlf. 423006
*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

### Gudstænastur
**9. sunnud. e. trinitatis**
Skála: kl. 11, Jógvan Fríðriksson
Vestmanna: kl. 11, Martin R. Jacobsen
Vesturkirkjan: kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen
Fríðrikskirkjan: kl. 11, Meinhard Bjartalíð
Gásadalur: kl. 11,
Mykines: kl. 18, David Johannesen
Havnar kirkja: kl. 11, lestur
Nólsoy: kl. 12, Sonja Klein
Viðareiði: kl. 11, altarg., Elsa Funding. (Talvan gongur fyri føroysku Sjómansmissiónina)
Eiði: kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen
Christianskirkjan: kl. 11, lestur
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10, Karl Gudmund Henriksen
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30 Elsa Funding
Sumba: kl. 12, Erland Beder
Tvøroyri: kl. 11, fráfaringargudstænasta, Petur Martin Rasmussen
Skopun: kl. 12, Kjartan Mørkøre

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 17.30: bønarløta. Um viðrar, verður útimøti uttanfyri kirkjuna sunnukvøldið kl. 18 við luttøku av familjuni Fonsdal í Vestmanna og Magna Christiansen o.ø. Aftaná verður hugna- og lovsongsløta inni í missiónshúsinum.
Mikumorgunin kl. 7: bønarløta.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 møti. Øll eru vælkomin.

### »Tíð til Gud«
Vit koma saman úti í Pállstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Regin Guttesen vitjar við einum boðskapi. Verið hjartaliga vælkomin.

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit. Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit. Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Jacques Adams í Mariukirkjuni.

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangel. møti, kl. 21.00: útimøti.
Mikukvøldið kl. 20: bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: kl. 17.30 bøn og kl. 18.00 møti, har John Petersen talar. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitshúsið
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Hjørleif Poulsen.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn.
Í morgin kl. 11 morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 18 kvøldmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 22 útimøti v/ Filadelfia.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo http://www.filadelfia.fo

### Hvítusunnusamkoman
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ Jón Miðberg. Mánakvøldið kl. 20 bíbil- og bønarmøti.

### Útimøti
Heimamissiónin hevur útimøti leygardagin kl. 18 í Saksun og kl. 20 í Hósvík.

### Filadelfia, Sundalagi
Sunnudagin kl. 17 bønarmøti, kl. 18 útimøti v/ Theodor Petersen.

### Ørkin, Saltangará
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 19.00. Týsdagin kl. 20 verður húsmøti hjá Jonnu og Palla Højgård, Saltangará. Verið hjartaliga vælkomin.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Útimøti verður í kvøld kl. 21 á Høgabóli. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.00: Opið hús v/ Helga Abrahamsen.
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti v/ Rannvu Royðutoft.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

### Soli Deo Gloria
Leygardag kl. 9.00: Bøn.
Sunnudag kl. 18.00: Møti
Mánadag kl. 20.00: Bønarmøti.

### Betania, Skopun
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 kvøldmøti við barnavælsignilsi, Karen og Curt Nielsen luttaka. Øll eru vælkomin.

### Cafe One Way, Tvøroyri
Fríggjakvøldið kl. 21: Ungdómstreff, Eyðun og onnur úr Evangeliihúsinum luttaka.
Leygarkvøldið er útifundur kafein er opin aftaná.
Sunnukvøldið kl. 21: Filmur vegna One Way.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Árna og Ásbjørg Kjærbæk. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Vági
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

### Klókt at játta og taka møguleikan fyri fyrigeving og nýggjari tænastu

*Luk.16,1: Ein ríkur maður hevði ein húshaldara .....*

At vera húshaldari er støðan hjá okkum øllum. Vit eiga einki sjálvi. Alt, sum fer í gjøgnum hendur okkara, egna likam okkara og alt lív okkara, tilhoyrir Guði. Vit eru ikki nakrir leigulendingar, sum gjalda Guði eitt leigugjald og síðan kunnu gera tað, vit ynskja, við restina av pengum okkara, tíð okkara og evnum okkara. Vit eru umsitarar.

Tað er sostatt at søpla tað burtur, um tú nýtir lív títt, tíð tína og ogn tína, sum ræður tú yvir tí sjálvur. Og tað er júst hetta, sum so nógv menniskju gera. Tað er tað teimum tað mest sjálvsagda av øllum, at tey hava rætt til at liva so. Tað vísir, hvussu langt burtur tey eru frá Guði.

So kemur Guð ein dag og ger upp. »Hvat er hetta, sum eg hoyri um teg? Legg fram roknskap fyri húshald títt!« Og her hava vit nakað at læra av tí lítarleysa húshaldaranum.

Hann var ein svíkjari og eitt bartrog. Men hann var klókur. Tað er tað, húsbóndin og Jesus rósar honum fyri. Í líknilsum sínum sigur Jesus vissuliga ikki altíð, hvat ið vit skulu gera í hvørjum einstøkum føri. Eisini maðurin, sum fann ein dýrgrip í akuri sínum, var óreiðuligur. Men sovorðnir vanligir syndarar kunnu mitt í sjálvsøkni sínum geva okkum eina mynd, sum sigur frá nøkrum, ið eigur at finnast í livinum hjá einum kristnum.

Her er tað klókskapin, talan er um. Hin lítarleysi húshaldarin gjørdi ikki sum so nógv menniskju, ið Guðs orð kallar til uppgerð. Hann bíðaði ikki. Hann fyrigyklaði sær ikki, at tað onkursvegna fór at laga seg. Hann visti, hvat ið fór at henda honum. Men hann sá, at her fanst ein útvegur, bara ein. Og henda tók hann avgjørdur.

Soleiðis áttu allir Guðs avdúkaðu umsitarar at gjørt. Bara við tí muni, at hin einasti møguleiki teirra er at játta alt og taka tann møguleika til fyrigeving og nýggja tænastu, sum stendur okkum í boði gjøgnum tað, sum Jesus hevur gjørt fyri okkum.

Halda vit fram at lesa hjá Lukasi, so ger Jesus eina nýtslu afturat av hesum líknilsi. Hann sigur, at vit kunnu fáa okkum vinir við hinum órættvísa mammon. Vit kunnu nýta pengarnar so, at menniskju fara at takka Guði. Alt fær ein enda, sum vit fingu at umsita her á jørð. Men eftir kann verða eitt samband og ein felagsskapur við tey, sum vit sluppu at tæna og gleða, sum heldur fram í Guðs ríki.

**Niels Pauli Danielsen**